# Annað lívið í Stóru Dímun




*- Ein má venja seg við ikki at kunna fara til handils hvønn dag, sigur Jóhan Petur, sum her kemur við dagsins innkeypi úr høvuðsstaðnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Jóhan Petur Olsen og Linda Sørensen av Argjum tóku fyri jól í fjør eina stóra avgerð: At flyta út í Stóru Dímun at arbeiða – hann sum húskallur; hon sum bóndakona. - Her er heilt ótrúliga gott at vera. Her fáa vit alt tað sum vit væntaðu og seta prís uppá - frið, avstressing og ró, siga tey bæði í samrøðu við Sosialin**

BYGDALÍV

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Stóra Dímun:** – Brúka tit mjólk útí drekkað?!

Vit sita við borðið í øðrum bóndahúsinum á Stóru Dímun. Linda hevur júst sett ein drekkamunn á borðið til mannin, Jóhan Petur og umboðini fyri tíðindatænastuna.

Koppar, tallerkar, nýbakað kaka er á borðinum í hugnaliga og heimliga køkinum. Men eingin mjólkarpakki. Tað er heldur ikki neyðugt.

Í fjósinum eru fleiri mjólkineyt, sum kundu veitt okkum ein dropa av mjólk í drekkamunnin. Men tað er ikki neyðugt í dag, tí eingin brúkar útí!

– Ja, hetta er annað lívið, sigur Linda við einum stórum brosi.

Tað krevur sína tíð at venja seg við lívið á útoyggj. Men slíkt kann altso gerast eftir trimum vikum. Tað er tann nýggja familjan í Stóru Dímun prógv um.

## Heit køka

At taka eina so stóra avgerð, sum at fara úr stórbýnum og til eitt so fjarskotið stað, er ikki ein slík, sum verður tikin yvir náttina.

– Ja, tað var hin húskallurin, Jógvan Jón sum byrjaði at tosa við meg um hetta fyri eini tveimum árum síðani. Hann luftaði tankan, men vit komu ikki nærri hesum tá.

– Vit hildu sjálvandi, at tað verið stuttligt at farið út her, men hetta hevði sjálvandi kravt nógva fyrireiking frammanundan, greiðir Jóhan Petur frá.

Meðan hann tosar við Sosialin, stákast Linda við at gera ein góðan drekkamunn í hugnaliga køkinum her í bóndans garði. Løtu seinni er nýbakað kaka og kaffi á borðinum.

– Eg skal siga tær akkurát sum er: Kakan var líðug í somu løtu sum tyrlan lendi. So hon er tí heit enn, sigur Linda.

Genturnar báðar – Rebekka (5 ár) og Rannvá (3 ár) fara beina leið innar í stovuna, har leikur teirra eru – og ein heingikoyggja, sum tær hugna sær óført við.

Alt bendir á, at tey fýra hugna sær herúti. Tað er ikki á hvørjum degi, at tey fáa slíkar gestir í oynna.

**Lesið meira á næstu síðunum**